# AGANEVNDIN

**KÆRA 2/2020**

| *FSF-skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: Leikbannaður leikari í U21-dysti HB-Skála, 30. aug. 2020** | |
| Deild: U21 dreingir | Hvør hevur reist málið: FSF |
| Kapping: Landskapping | Kæra móttikin: Dómarafrágreiðing 30.8.2020 |
| Møguligt brot framt: 30. aug. 2020 | Kærugjald goldið: óviðkomandi |
| Partshoyring: Ja | 5 daga kærufreist hildin: Ja |
| Áheitan um munnliga viðgerð: Nei | Starvsnevndarummæli: Ongar viðmerkingar |

## Úrskurður

Aganevndin staðfestir, at tað er skjalprógvað á dómaraseðlanum í Comet-skipanini, at umrøddi HB-leikari var leikbannaður til nevnda dyst og sambært dómarafrágreiðingini, at leikarin leikti í nevnda dysti.

Av tí at leikarin varð leikbannaður sambært § 37a í Kappingarreglunum fyri fótbólt, verður HB dømt at tapa dystin 0-3 sambært § 41 í Kappingarreglunum fyri fótbólt. Felagið kann kæra úrskurðin til Yvirkærunevndina. Kærufreistin er 5 dagar.

## Kæran, partshoyringin og møguligt Starvsnevndarummæli

Sambært Comet-skipanini hjá FSF, var Regin í Geil leikbannaður til dystin móti Skála 30. august og kortini spældi leikarin fyri HB.

HB er hoyrt í málinum og hevur onga viðmerking.

Starvsnevnd FSF´s hevur ongar viðmerkingar til málið.

## Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið

Vísandi til grein 2, 5 og 7 í agareglugerð FSF's, hevur Aganevndin málsføri at viðgera hetta mál.

## Fakta í málinum

Sambært Comet-skipanini hjá FSF, var Regin í Geil Jacobsen leikbannaður til dystin móti Skála 30. august og kortini spældi leikarin fyri HB, hóast ikki við í upprunauppstillingini. Sambært dómararfrágreiðingini, skoraði leikarin einasta málið í dystinum.

## Lógarverkið

Sambært § 1, stk. 1 og § 1, stk. 3 í Kappingarreglunum fyri fótbólt, eru kappingarreglurnar galdandi fyri allar dystir í lands- og steypakappingingini – eisini tá talan er um U21 menn.

Sambært § 37a í Kappingarreglunum fyri fótbólt, kann leikbannaður leikari ikki lógliga leika dyst, fyrr enn leikbannið er sitið av.

Sambært § 41 í Kappingarreglunum fyri fótbólt er ásett, at "Verður lið dømt at tapa dyst, verður málmunurin 0-3 roknaður."

Sambært § 8, litra h í Agareglugerðini, kann Aganevndin sekta felag at tapa dyst. Sambært § 12, litra f kunnu úrskurðir um, at felag tapir dyst, kærast til Yvirkærunevndina. Kærufreistin er 5 dagar.

**Staðfestingar, metingar og niðurstøða**

Aganevndin staðfestir, at tað er skjalprógvað við dómaraseðla og dómarafrágreiðing, at HB-leikarin leikti í U21-dystinum HB-Skála, hóast leikarin var leikbannaður.

Fordømi eru um, at brúk av ólógligum leikara elvir til, at felag verður dømt at tapa dystin sambært grein 8, stk. 1, bókstav h í Agareglugerðini.

Niðurstøðan er, at HB verður dømt at tapa dystin 0-3 sambært § 41 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

**Kæruvegleiðing**

Sambært grein 12, litra f í Agareglugerðini, kann úrskurðurin kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar eftir, at HB hevur móttikið úrskurðin.

**Staður, dagfesting og undirskrift:**

**Tórshavn 18. august 2020**

Anni á Hædd

**Anni á Hædd**

*forkvinna*

Aganevndin, ið viðgjørdi hesa kæru: Anni á Hædd, løgfrøðingur og forkvinna, Ken Nónklett, løgfrøðingur og næstformaður og Sissal Kj. Kristiansen, ráðgevi.